

Óli Jacobsen
olijacobsen@post.olivant.fo

Tá vit høvdu staðið eina løtu, fóru vit aftur at ganga og komu so til eini hús. Vit høvdu avrátt at fara inn í fyrstu hús, vit sóu. Har var myrkt, men vit bankaðu uppá. Hetta var um millum kl. 12 og 2 um náttina. Ein kona kom og lat upp og spurdi, hvørjir vit vóru. Vit søgdu, at vit vóru føroyingar. Um vit kundu geva henni hondina uppá tað? Ja, tað gjørdu vit. Tað hevur undrað meg mangan, at hon skuldi klára at taka ímóti okkum. Vit høvdu skorið kapokkpúturnar av bátinum, og høvdu stúvað tað innan fyri klæðini fyri hita, og vit høvdu gjørt hettur burtur úr segldúkinum.

Jógvan Elias hevði verið so framskygdur, at hann tók knívin við sær, tá hann fór av Tór II. Hetta gjørdi tað møguligt at kryvja púturnar, so tilfarið kundi koma okkum til hjálpar. Soleiðis komu vit inn til hana. Vit hava sæð út sum villmenn, men hon var púra rólig. Vit fingu so kaffi frá henni við sukuri og brennivíni í, men vit fingu einki at eta.

So ringdi konan til løgregluna og varskógvaði um hetta, sum hent var. Løgreglan kom við einum lastbili eftir okkum. Tá vit vóru lidnir at drekka kaffi, fóru vit uppí lastbilin. Men tað var ein drúgvur túrur. Ja, eg ynskti at eg skuldi verið deyður, so kalt var tað.

Vit komu niðan á hospitalið. Har var sjálvandi heitt inni, og tað var skjótt, at vit komu fyri okkum aftur. Vit vóru so á hospitalinum í nakrar dagar. Vit vóru, sum rímiligt er, illa fyri. Tá sjúkrasystirin kom inn á stovuna, eftir at vit vóru sovnaðir, stukku vit sjóleysir upp úr songini, og morgunin eftir kundu vit ikki reisa okkum úr songini.

Men tá vit vóru so frægir, fóru vit í býin at keypa okkum klæðir. Tað var onkur á hospitalinum, sum lænti okkum okkurt at fara í, so vit kundu fara út at keypa okkum egin klæðir. Vit máttu keypa alt av nýggjum, tí vit høvdu jú einki at fara í. Okkara egnu klæðir vóru ikki nógv verd eftir ferðina. Danska sendistovan rindaði fyri klæðini.

## Aftur á slóðina

Meðan vit vóru á hospitalinum, so kom henda sjúkrasystirin og bað meg koma oman á skurðstovuna, og so viðgjørdi hon beinini. Tey vóru nokk so illa farin.

Eg fór seinni at fregnast eftir henni. Eg bað einaferð sjómanstrúboðaran Johan Olsen gera mær tann beina at sóknast eftir teimum, sum høvdu tikið ímóti hesum skipbrotnu føroyingunum. Tað gekk bert ein vika, so fekk eg samband við hana.

Eg fór saman við konuni yvir til Íslands. Vit høvdu fólk har yviri, sum vit kendu væl, nevniliga Hartvig, sum var flúgvimekanikari, tá íslendarin fleyg her. Konan kallaðist Halda. Vit fóru fyrst við flogfari til Vestmannaoyggjarnar, og vit sóu staðið, har vit komu á land.

Vit vitjaðu eisini umrøddu sjúkrasystrina í Hverðagerði, nærindis Reykjavík, har hon búði. Vit høvdu samband í nógv ár. Hon segði, at hon mintist hendingina við okkum trimum, sum var tað í gjár.

## Beinleiðis til skips aftur

Tá vit høvdu fingið okkum klæðir, fóru vit inn á fastlandið við einum fiskibáti og so við rutubussi til Reykjavíkar.

Tá vit høvdu verið í nakrar dagar í Reykjavík og búð hjá amerikanarum, fingu vit pláss at búgva í eini barakk. Har kom fólk, sum var torpederað á rutuni frá Amerika til Íslands og so frá Íslandi til Murmansk. Har vórðu so nógv skip søkt.

»Thor« kom inn í Reykjavík. Hon lá har og skuldi keypa fisk, og vit kundu saktans sleppa heim við henni. Men tað fór so at taka nakrar dagar, áðrenn skipið var fult.

Men samstundis kom trolarin »Leivur Øssursson« inn, og hann manglaði tveir mans. Teir vildu so fegin hava okkum við út at fiska. Tað høvdu vit, sum rímiligt er, ongan serligan hug til, men lótu okkum sannføra. Vit báðir, eg og Jógvan Elias, fóru so út at fiska. Vit vórðu væl móttiknir har umborð.

Skiparin á »Tór II«, Óli Fossaberg, varð eftir í Íslandi. Vit fiskaðu so túrin út uppi á Halanum og fingu nakað av fiski. Vit sigldu heim fram við Norðlandinum og sigldu úr Langanesi til Føroya.

Tað ljóðar ótrúligt, at vit skuldu fara umborð og fiska á somu leiðum, har vit vóru torpederaðir; men soleiðis var tað bara.

## Endiliga heima

Vit komu so heim og vóru á Havnini tann 4. november, sum skipbrotið var hent 7. september. Vit komu í land niðri í Vágsbotni. Tá eg kom í land var genta mín, Herborg, har. Hon hevði frætt, at vit skuldu koma. Eg gisti á sjómansheiminum, og dagin eftir fór »Streymur« hjá Mjólkaforsýningini úr Havnini vestur í Vágar. Eg fór vestur við og kom upp á land í Miðvági; men her var trupulleikin, at eg hevði einki pass. Tað var jú farið, og pass var neyðugt fyri at sleppa upp á land í Vágum, tí Vágar var høvuðsstøðin hjá bretska hervaldinum. Men Einar Weihe var á bryggjuni har. So fór eg til hansara, hann var stinnur í enskum, og bað hann tosa fyri meg og greiða frá, hvussu vorðið var - og tá var alt í lagi. Eg slapp so út til Sørvágs við einum lastbili hjá hervaldinum, og glaður var eg, tá eg var heimkomin.

Eingin visti av tí, tá eg henda fyrrapartin kom til Sørvágs. Eg varð væl móttikin. Mamma mín stóð og elti breyð, og hon mundi vera líka glað sum eg.

Ein slík hending mátti seta síni merki. Tað var nokkso tungt, men eg svav kortini altíð væl.

Minnist, at tá eg var afturkomin, helt eg meg nógv fyri meg sjálvan. Var ræddur fyri, at fólk skuldi koma og spyrja meg um túrin. Hesum mátti eg koma burturúr, og eg mátti koma millum fólk aftur. Pápi hevði velt epli úti á Bakka. Men so einaferð, tá eg tók upp eplir, tá fór eg út við teimum. Tá arbeiddu so nógvir hjá eingilskmonnum, og teir hugdu, sum vituligt er, at mær. Har var ein maður, Louis Joensen, sum kom og ynskti mær væl afturkoman. Tað var eitt gott medisin og hjálpti til, at eg kom fyri meg.

Av teimum 21 monnunum við »Tór II«, vóru 12 mans giftir.

Malmberg doyði í 2005. Herborg livir enn.



*Malmberg á Eiðinum í Vestmannaoyggjunum, har teir illa tuskaðu menninir av Tór II komu á land*



*Óli Fossaberg av Stykkinum var skipari á Tór II. Hann var ein av teimum trimum, sum bjargaðust*



*Malmberg saman við sjúkrasystrini Guðrun Helgadóttir, sum tók ímóti teimum á sjúkrahúsinum í Vestmannaoyggjunum*

**Komandi partur**
Tað verður ein partur afturat um sigling unditr krígnum. M.a. um hondina, sum í dreymi vísti á kósina til neyðstadda manning